

# Fýlast á nýggja útbjóðing í Barentshavinum

**Jan Müller**

10.04.2014 - 19:30

Oljan.fo

Átta umhvørvisverndarfelagsskapir finnast nú at avgerðini hjá norska olju- og orkumálaráðharranum, Tord Lien, at loyva feløgum at bora eftir olju á leiðum, sum liggja inn at tí viðkvæmu ísrondini.

Boðskapurin frá felagsskapunum er, at oljufeløgini hava einki at gera í Barentshavinum, og tey mæla tí olju- og orkumálaráðnum frá at geva oljufeløgum atgongd til tað viðkvæma økið við ísrondina. Tað skrivar Dagens Næringsliv.

Teir átta umhvørvisverndarfelagsskapirnir vísa á, at sambært norska pólstovninum eru fleiri av leiðunum, sum nú verða bodnar út, innan fyri ísrondina, og at tann tøkni, sum er tøk til rudding í dag, er ikki nóg góð til at rudda eftir eitt møguligt óhapp við ísrondina.

-Skuldi tað hent, at stjórnin gongur ímóti teimum fakligu tilráðingunum og sunnari vitan og samtykkir at lata øki til oljuboring, er tað umráðandi, at feløgini fáa boð um at halda

seg langt frá ísrondini, skriva teir átta felagsskapinir í einari áheitan á olju- og orkumálaráðið.